

Oljufeløgini pakka saman og rýma úr Grønlandi. Tað er ov dýrt og vágin ov stórur í løtuni at leita eftir oljuni. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Oljufeløgini lata leitiloyvir innaftur í Grønlandi

**Jógvan Hugo Gardar**

15.01.2015 - 09:59

Oljan.fo

Dreymurin um at finna olju í grønlendsku undirgrundini tykist at vera ræ̈ttuliga langt burturi. Á nýggjárinum lótu trý oljufeløg innaftur síni leitiloyvir, og fleiri oljufeløg hava søkt um at fáa freistina fyri nær tey fara at leita útsetta.

Tey trý oljufeløgini norska Statoil, franska GDF Suez og danska Dong hava latið síni loyvir innaftur, tí tey eru komin til at vágin er ov stórur og útlitini til at finna olju tykjast at vera smá.

Samstundis hava fleiri onnur feløg søkt um at fáa nýggjar freistir, so tey hava betri stundir til at meta um tey vilja gera tær íløgurnar sum skulu til fyri at leita eftir olju í Grønlandi. Millum hesi oljufeløgini finna vit Shell, Maersk og Cairn Energy.

Skotska oljufelagið Cairn Energy brúkti í 2010 og 2011 umleið sjey milliardir krónur til fleiri boringar, ið allar vóru úrslitaleysar. Sambært Politiken stongdi Cairn á nýggjárinum sína skrivstovu í Nuuk, og felagið hevur ongar ætlanir um at lata skrivstovuna upp aftur.